# Til læraran




Rithøvundur: Elin á Rógvi
Bókadeild Føroya Lærarafelags 2024
Nám: Gunvá Magnussen, Lis G. í Jákupsstovu og Marjun Ziskason

## Um bókina

*Fornt* er um 11 ára gamla Eira og vinkonu hansara Silju. Tey búgva í Havn, men Eiri er eisini norðuri á Eiði, tí mamma hansara er av Eiði og omman býr har saman við hundinum Niko. Eira dámar væl at spæla telduspøl, serliga Fornt, sum er eitt føroyskt telduspæl. Eiri dugir ikki so væl sum onkrir av floksfeløgunum, men kortini eydnast honum at finna útav onkrum, sum gera spælið og bókina spennandi. Samstarvið við Silju ger, at tað gongur enn betur hjá Eira, og áðrenn hann veit av, er hann blivin kendur forntspælari.

Elin á Rógvi hevur skrivað spennandi bókina *Fornt,* sum upprunaliga varð skrivað til útvarpsleik í 2020, leikurin varð sendur sum jólakalendari sama árið.

Silja Eystberg hevur myndprýtt bókina og Bókadeild Føroya Lærarafelags gav hana út í 2024.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar eru gjørdar eftir leistinum *áðrenn tú lesur*, *meðan tú lesur* og *tá ið tú hevur lisið*. Talan er bæði um einstaklinga- og bólkauppgávur.

Bókin er 193 síður í 18 pørtum.

Uppgávurnar eru ætlaðar 4. – 6. flokki. Tað er ymiskt, hvussu nógvar uppgávur eru til hvønn partin, og hvussu nógva tíð tað tekur at arbeiða við teimum. Mett verður, at 15 – 20 tímar kunnu setast av til undirvísingargongdina.

Gott hugskot er at hava eitt hefti at skriva í. Næmingarnir kunnu eisini gera eina mappu á telduni.



©Nám

# Áðrenn tú lesur




## Hygg at bókini

- Hygg at permuni, hvør hevur skrivað bókina?

- Hvør hevur myndprýtt bókina?

- Hvat fert tú at hugsa um, tá ið tú sært permuna?

- Les tekstin á baksíðuni og hygg at myndini. Hvat væntar tú, at bókin er um?





©Nám

# Meðan tú lesur

## 1. partur – Skuggin

### Spælið

Hvat merkir Fornt?

- Leita á sprotin.fo, minst til at skriva orðið í kallkyni.
- Nær leggur tú til merkis, at byrjanin í partinum er eitt spæl? Greið frá.

________________________________________________________________

________________________________________________________________

________________________________________________________________

________________________________________________________________

### Órógvaður

Mamma Eira støðgar spælinum beint, tá ið tað er ógvuliga spennandi.

Tosið saman tvey og tvey um støðuna.

- Hvat halda tit um tað, sum mamman ger?
- Hvussu kundi støðan verið loyst øðrvísi?
- Hvat høvdu tit sagt ella gjørt, um tit upplivdu tað sama sum Eiri?

### Hvar?

Hvar eru vit stødd í spælinum?

- Í hvørjum landi? ___Føroyum__________________________________________
- Á hvørjari oyggj? __Eysturoy__________________________________________
- Í hvørjari bygd? ____Elduvík_________________________________________





©Nám

## 2. partur – Pakkafest

### Familjan

Tit skulu arbeiða við hesum brotinum úr partinum.

-Dora kanst tú ikki siga mær frá, um tú ikki kemur at eta?
-Tú ert ikki mamma mín, físir Dora.
Mamman heldur uppat at røra í eplamosinum.
- Nei, tað eri eg ikki, men tað er gott at vita, um mann skal gera mat til trý ella fimm.
… - Handan pakkafestin er ikki at gera mat! Pakkaeplamos, frystar pakkafrikadellir …
-Ein pakka av mjólk! Sigur Lín glað.
- Akkurát, flennir Dora. Ella næstan, annar munnvikin vikast eitt vet.
- Eg vil hava, tú sigur mær frá.

Í brotinum lesa vit um familjuna. Vit fáa at vita, at mamman ikki er mamma Doru.

- Hvat meinar Dora við, tá ið hon sigur: "Handan pakkafestin er ikki at gera mat!"?

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

- Skriva nøvnin á reglurnar





©Nám

## 3. partur – Kann eg sleppa við?



### Spøl

Vit fáa at vita, at tað eru tveir mátar at spæla spælið: varnast og jagstra.

- Kenna tit til spøl, sum hava hesar møguleikar ella okkurt, sum minnir um? Um tit kenna onkur, skrivið hvussu tey eita.

### Søgn

Vit hoyra um, at ein nýggj dagføring verður, og at hon fer at vera um risar og kellingar. Tá ið Eiri og Boas snakka saman, tá nevnir Eiri okkurt um eina søgn um Risan og Kellingina norðuri á Eiði.

- Farið á snar.fo og lesið søgnina.

### Eiri, Boas og Sólja

- Greið frá, hvussu Eiri er.

- Greið frá, hvussu Boas er.

- Greið frá, hvussu Sólja er.



©Nám

## 4. partur – Varnast

### Hvat veitst tú?



Í 4. parti fáa vit meira at vita um spælið Fornt.

- Skriva, hvat tú nú veitst um spælið.

### Orðaveiða

- Finnið hvør sær seks orð úr partinum, og skrivið hvat tey merkja.

| Orð | Orðini merkja |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |



©Nám

# 5. partur – Barnagenta

## Tjena pengar

Eiri og Sólja snakka um at gera krav uppá myndina av veruni, sum tey hava funnið. Tey avtala eisini at deila pengarnar.

- Kenna tit hetta aftur úr spølum? Tosið saman í smærri bólkum.

## Skermnýtsla

Eiri lovar mammuni at ansa eftir Lín í 45 min., men tá ið hann fer at spæla Fornt, gloymir hann alt um Lín.

- Hvat hendir við Eira, tá ið hann spælir Fornt? ____________________

____________________

____________________

____________________

Avmarka foreldrini hjá tykkum eisini, hvussu nógv tit sleppa at brúka skerm? Tosið saman í flokkunum um spurningarnar niðanfyri.

- Um ja, hvussu leingi sleppa tit at brúka skerm hvønn dag?
- Um nei, hvussu leingi brúka tit skerm hvønn dag?
- Hvat brúka tit skermin mest til?





©Nám

## 6. partur – Hvar ert tú?

### Shapeshifter

Tit skulu arbeiða við hesum brotinum úr partinum.

> Hann er so kendur, øll vilja vera sum hann … Hann er so vakur, sum er hann komin beint úr einum filmi, tosar enskt, sum er hann úr USA, og so er hann ógvuliga ríkur, og hann er blivin ríkur av at spæla Fornt. Tað er arbeiðið hjá honum … Hugsa tær … Einki kontór við vánaligum kaffi og hálvsovandi starvsfeløgum, nei, Shapeshifter kann, tað hann vil … Hevur fleiri fólk í starvi … eitt nú ein persónligan venjara og ein kokk … Hann má venja, so gott sum hann sær út og so aftaná ein túr í privatu venjingarstøðini sita og spæla Fornt og senda beinleiðis á Tútúbe. Áhhh, hvat summi eru heldig … og so er hann føroyingur … Tað ger dreymin so nógv meira veruligan … at tað ber til hjá honum, ger, at øll kenna á sær, at kanska tey eisini kunnu liva av at spæla Fornt. Eiri droymir eisini um tað … men nú situr sjálvur Shapeshifter og tosar um hann á Tútube. Hetta má vera ein dreymur ...

Shapeshifter livir dreymin hjá Eira.

- Kundi tú hugsað tær at verið Shapeshifter? Um ja, greið frá hví. Um nei, greið frá hví. ________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

- Veitst tú um nakran, sum livir sum Shapeshifter? Nevn tey. ______________________________

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

- Hvat hevur nýggja veran at týða fyri Eira? Tosið saman tvey og tvey.



©Nám

## Søgnin um marmennilin

Vit fáa at vita, at veran er ein marmennil.

Farið á snar.fo og finnið søgnina um marmennilin. Lesið søgnina og svarið spurningunum niðanfyri.

- Hvat er søgnin um? ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

- Hvar í landinum eru vit stødd í søgnini? ______________________________

- Samanberið søgnina og tað, sum Eiri og Sólja uppliva, tá ið tey finna veruna í Fornt.



Fornt    Líkleikar    Søgnin



©Nám

# 7. partur – Gullkistan

## Kendur

Telefonin ringir, Eiri fær boð frá nógvum fólkum, øll vilja hava fatur á honum.

- Hvussu hevur Eiri tað nú, tá ið øll vilja hava samband við hann? ____________________________

____________________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________________

## Teknirøð

- Ger eina teknirøð til hendingina í spælinum í Lítlu Dímun.



©Nám

## 8. partur – Hjálpir at hava góð vápn

### Eiri

Í hesum partinum hoyra vit eitt sindur um, hvussu Eiri er. Tosið saman tvey og tvey.

- Hvussu er Eiri, eftir at hann er blivin “kendur”.
- Hvat sigur Eiri um seg sjálvan?

### Vinmenn

Eiri og Boas snakka saman.

- Hvat sigur Eiri um Boas og aðrar dreingir í flokkinum? ______________________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

- Hvussu hevur Eiri tað, tá ið hann er liðugur at snakka við Boas? ______________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

## 9. partur - 3 … 2 … 1 … Nú

### Orðaveiða

- Arbeið saman við einum makkara og prátið um orðini í talvuni. Skrivið, hvat tey merkja.

| Orð | Orðini merkja |
|---|---|
| Deyðagras | |
| Umvarp | |
| Mosagrógvin | |
| Bøkkur | |
| Eldvarpari | |



©Nám

## Risin og Kellingin

Dagføringin av Fornt, Risar og Kellingar, er klár at spæla. Spælt verður á Eiði.

Hygg í eitt atlas. Atlas til Heim og skúla er brúkt til svarini.

- Hvussu høgur er Kollurin? __338m__________________________________________
- Hvussu høgur er Risin? ______71m____________________________________________
- Hvussu høg er Kellingin? _____69m___________________________________________
- Hvussu eitur økið har umvarpið er? __Mølin ella Niðri á Møl__________________
- Eitt stórt vatn er beint við Eiði, hvussu eitur tað? __Eiðisvatn______________
- Tvey tey hægstu fjøllini í Føroyum eru beint við Eiði. Hvussu eita tey, og hvussu høg eru tey?

  ___Slættaratindur 880m_____________________________________________

  ___Gráfelli 856m___________________________________________________



## Samheiti

- Finn samheiti til orðini í talvuni.

| Orð | Samheiti |
|---|---|
| Fimur | |
| Fjarstøða | |
| Kimiligur | |
| Skimast | |
| Toyggj | |
| Tøgn | |
| Trossi | |



©Nám

# 10. partur – Alt oyðilagt

## Gívurin á Sandi

Í 10. parti hoyra vit um gívrina á Sandi.

- Lesið søgnina á snar.fo
- Finn 8 villur í niðaru tekningini.







©Nám

## 11. partur - Eiði

### Familjan á Eiði

- Hvat fáa vit at vita um ommu og abba Eira? ____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

- Hvussu er staðið har, sum omma Eira býr? ____________________________________________

____________________________________________

- Hvat slag av hundi heldur tú, at Niko er? ____________________________________________

- Greið frá, hvussu Niko uppførir seg? ____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________



## 12. partur - Túr við hundinum

### Omman og Niko

- Hvat fáa vit at vita um ommuna?

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________

- Hvat fáa vit at vita um Niko?

____________________________________________

____________________________________________

____________________________________________



©Nám

## 13. partur – Hvar hevur tú verið?

### Sólja

Í 3. parti gjørdu tit lýsing av Sólju.

- Skriva, hvat meira vit nú vita um hana. ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

## 14. partur – Renn

### Persónar

- Greið frá, hvat vit nú vita um Shapeshifter. ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

- Hvat hendir við mammuni, hvat vita vit um hana? ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

- Hvat hendir við Eira í hesum partinum? ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________



©Nám

# 15. partur – At síggja eld

## Haikuyrking

- Lesið s. 144-145. Gerið eina haikuyrking um tað, sum hendir við Eira.
  Ein haikuyrking skal vera tríggjar reglur við 5, 7 og so aftur 5 stavilsum.

Eiri hugsar nógv
Eiri er Fornt spælari
Eiri dugir væl

## Sólja og nykar

- Takið samanum tað, sum Sólja sigur um nykar. ______________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

______________________________________________________________

__________________________________________

__________________________________________

__________________________________________





©Nám

# 16. partur – Meira modernaður

## Hvat vita vit nú?

- Hvat vita vit um abban? ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

- Hvussu lýsir Nikodemus nykar? ______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

- Hvønn týdning hevur violinin hjá abbanum?______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

- Hvat ætlar Shapeshifter?______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

- Hvussu ætla abbin, Eiri og Sólja at steðga Shapeshifter?______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________





©Nám

## 17. partur – Tjørnin

### Shapeshifter

- Lýs Shapeshifter sum Eiri sær hann. ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

## 18. partur – Leikur kallar

### Endin

- Hvussu eydnast ætlanini, hjá Eira, Sólju og Nikodemusi? Greið frá. ______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________





©Nám

# Tá ið tú hevur lisið bókina

## Endursøgn ella teknirøð

- Skriva endursøgn um alla bókina ella ger eina teknirøð, sum fortelur søguna.
- Leggið fram fyri flokkinum.



©Nám

## Samtíðarsøga

Fornt er ein samtíðarsøga.

- Hvat er ein samtíðarsøga? Ein søga, sum er um eitthvørt, sum hendir um somu tíð, sum hon er skrivað.
- Hvørji tekin eru um, at hetta er ein samtíðarsøga? Telduspæl, samskiftið ímillum børnini er ofta á telduni ella telefonini, fólk úr øllum heimi koma til Føroyar, tøknin, samansett familja, o.a.
- Skrivið 3 dømi hvør.
- Samanberið tykkara dømi í flokkinum.

## Fornt

Bókin eitur Fornt. Tosið saman tvey og tvey.

- Hví man hon eita so?
- Vísið á dømi í bókini, sum eru forn. Her kunnu allar sagnirnar nevnast og tað, sum er í sagnunum.

## Bókaummæli

11-orðs bókaummæli

1. regla: Heitið á bókini (eitt orð)
2. regla: Høvuðspersónur (tvey orð)
3. regla: Tema í bókini (trý orð)
4. regla: Hvat er bókin um (fýra orð)
5. regla: Lesiuppliving (eitt orð)



©Nám

Dømi um handgjørt 11-orðs bókaummæli.






©Nám

Dømi um teldugjørt 11-orðs bókaummæli.






©Nám